# HEILSANIR



**Góða mamma og babba**
Hjartaliga tillukku við koparbrúðleypsdegnum.
**Sára**



Fyri fimti árum síðani var tað eisini moderna at koyra á skutara. Tillukku við degnum tann 6. nov.
**Heilsan vit í Hoyvík**



**Góði maður**
Hjartaliga tillukku við 70 ára degnum 6. nov.
**Heilsan kona tín**



**Góði pápi og verpápi**
Hjartaliga tillukku við 70 ára degnum
**Heilsan børn og svigarbørn**



**Góða langomma og olduromma**
Hjartaliga tillukku við 81 ára degnum 26. okt. Gud signi framtíð tína.
**Jóannes, Gunnar, Ísak og lítli beiggi**



**Góði gubbi**
Hjartaliga tillukku á 23 ára degnum og alt gott í framtíðini. Vóni at tú fært ein góðan dag.
**Heilsan lítla Marjun**



**Anita Hansen á Kambsdali**
Góða elskaða dóttir og systir. Hjartaliga tillukku við 4 ára degnum 4. nov. Jesus pápi signi teg.
**Bestu heilsur mamma, babba og beiggi**



**Góða Jana**
Nú heldur tú, eg havi gloymt teg, men nei. Hjartaliga tillukku við føðingardegnum 24. okt. Minnist tú?
**Heilsan hin sum var við**



**Góðu Martin og Dánjal**
Hjartaliga tillukku við føðingardøgunum.
**Heilsan omma og abbi**



**Góði abbi**
Hjartaliga tillukku við 70 ára degnum 06.11. Eisini ein heilsa til ommu.
**Heilsan abbadóttirin í Japan og abbasonurin í Jyllandi**



**Góði abbi**
Hjartaliga tillukku við 70 ára degnum 6. nov.
**Heilsan Tove, Leila, Liss og Janna**



**Góði abbi**
Hjartaliga tillukku við 70 ára degnum 6. nov.
**Heilsan Elita, Erna, Jógvan Rasmus og Jens**

## Heilsanir

30,- kr. Sosialurin

**5 ferðir um vikuna**

### Gevið gætur

Bert heilsanir, skrivaðar á henda lepan og goldnar frammanundan við 30,- kr. fáa innivist í blaðnum. Til ber eisini at lata okkum lepan og gjald í avgreiðsluni á Argjavegi 26, millum kl. 8.00 og 16.00.

**Myndaheilsanir skulu vera okkum í hendi á miðdegi 2 dagar fyri útkomudag.** Viðmerkið annars niðanfyri, um heilsanin ynskist í blaðið ávísan dag.
❑ Týsd. ❑ Mikud. ❑ Hósd. ❑ Fríggjad. ❑Leygard.

Tekstur:.......................................................................
.......................................................................
.......................................................................
.......................................................................
.......................................................................
.......................................................................

**Myndina aftur:** Minnist til at skriva navn og bústað aftanfyri á myndina og at leggja við ein frankeraðan brævbjálva við navni og bústaði.

Um neyðugt fyri arbeiðsgongdina, taka vit okkum rætt til at fáa heilsanina í blaðið annan dag, enn tann ynskta.

Sent hevur (skal fyllast út).
Navn: .......................................................................
Bústaður: .......................................................................
Bygd/býur: .................................. Tlf.: ...............

Sendið lepan, mynd og gjald til:
Sosialurin
Postsmoga 76 •110 Tórshavn
Merkið bjálvan: »**Heilsanir**«

Sosialurin
– hevur fingið nýtt telefonnummar
tel 34 18 00
fax 34 18 01
heimasíða: www.sosialurin.fo
teldupostur: post@sosialurin.fo



# TILTØK

**Frelsunarherurin, Tórshavn**
Hóskvøldið kl. 20 Heimaforbundið.
Leygardagin kl. 15.45 byrjar Familjudagur í Kommunuskúlahøllini og endar við nátturða í Frelsunarherinum kl. 18. Børn undir 10 ár mugu vera við vaksnum. Tilmeldan.
Sunnudagin kl. 11 Møti, major Knut Ytterdal, kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 17.30 Bønarmøti, kl. 18 Møti, Ytterdal talar. Eftir møti drekkamunnur og møti fyri soldatar og tilhoyrandi.

**Meinigheitin í Hoyvík**
*uppi á Brekku 3*
Í kvøld kl. 20 Ungdómsmøti v/ Eiriki & Jórun.
Fríggjadagin kl. 20 After Eight.
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 18 Møti.
Mánadagin kl. 20.30 Bønarmøti.

**Filedelfia, Landavegur 22**
Í annaðkvøld kl. 20 Ungdómsmøti.
Leygardagin kl. 17 Landsbøn.
Sunnudagin kl. 11 Morgunmøti v/ Rúna Rasmussen, kl. 18 Møti v/ Tummas Jacobsen.
Mánakvøldið kl. 20 Bønarskúlin. www.filadelfia.fo

**Samkoman Lívdin**
*í Hoyvíkar skúla*
Sunnumorgunin onki møti vegna samfelagsmøtir.
Týskvøldið samlast húsbólkarnir.
Heimasíðan. www.livdin.fo

**Katólska kirkjan**
Hvønn gerandisdag kl. 17.30 Orðsinstænasta við kommunión í Kerit.
Hósdagin kl. 20 verður Taizékvøld (bønarstund við sálmasangi úr Taizé) í bønarrúminum hjá Franciskanasystrunum, Varðagøta 16. Øll eru vælkomin.
Leygardag kl. 11.30 Orðsinstænasta við kommunión í Kerit.
Sunnudag kl. 11 Orðsinstænasta við kommunión í Mariukirkjuni. Sunnudagsskúli kl. 14.

**Ebenezer**
**Samfelagsmøtini halda áfram.**
Í dag kl. 10 Uppbyggingarmøti, kl. 16 Uppbyggingarmøti. kl. 20 Evangel. møti.
Fríggjadagin kl. 10 Uppbyggingarmøti, kl. 15 Uppbyggingarmøti.
Í Ítróttarhøllini á Hálsi Fríggjakvøldið kl. 20 Evangel. møti, kl. 22.30 Opið hús.

**Meinigheitshúsið**
Hósdagin kl. 16-17 venur Gentukórið, kl. 20 Ungdómsmøti, evni: Trúgvandi ítróttarfólk.
Leygarkvøldið kl. 19.30-22 Juniorhugni.
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 18 Møti v. Ejvind Mouritsen, Gentukórið syngur.

**Samkoman Rhema**
*Staravegur 5*
Fríggjakvøldið kl. 20 JC-Teens – spennandi ungdómsmøti har nógv ymiskt er á skránni.
Sunnudagin kl. 17 Møti og sunnudagsskúli.
Hvønn sunnudag er spennandi upplegg fyri børn s.s. sangur, skipa undirvísing, søgur, ítriv o.a. Hetta er dagurin fyri alla familjuna. Eisini verður kaffi. Øll eru vælkomin.
www.rhema.fo

**Kirkju- og missiónshúsið á Argjum**
6.-9. nov. Heystmøti við Finn Bjarnastein – serstøk skrá.

**KFUM og KFUK í Havn**
Hósdagin kl. 19 í KFUK: Basarur. Sí lýsingartorgið.

**Samkoman Immanuel**
Fríggjakvøldið kl. 20 Kongsins Herlið, 8 ár og eldri eru vælkomin.

**Tórshavnar Hvítusunnusamkoma**
*Yviri við Strond*
Sunnudagin kl. 11.00: Morgunmøti og kl. 18.00: Evangeliskt møti. Øll eru vælkomin.

**Aglow, Norðstreymoy**
Møti verður í Glæmuni í Kvívík fríggjakvøldið kl. 20. Allar kvinnur eru hjartaliga vælkomnar.

**Saron, Vestmanna**
Telefonandaktin 424741.

**Missiónshúsið Libanon, Sørvágur**
Sjómanskvinnuringurin kemur saman í missiónshúskjallaranum hóskvøldið 5. nov. kl. 20. Mint verður á jólapakkarnar. Allar kvinnur eru hjartaliga vælkomnar.

**Norðskála kirkja**
Kirkju- og missiónsvikan heldur fram í kvøld kl. 19.30. Bíbliutími: Rómverjabrævið, kl. 20 Møti við Sylveriusi Jacobsen, Skála.

**Keldan, Skálafirði**
Leygarkvøldið kl. 21 Opið hús.
Sunnudagin kl. 17 Møti við Paula Høj. Barnamøti kl. 17.
Vælkomin í Kelduna.
www.keldan.fo

**Kongshavnar Kvinnufelag**
Vit halda føðingardag hóskvøldið 6. nov. kl. 20.

**Skála**
Í kvøld kl. 20 Bíbliutími og bønarmøti við Jógvan presti. Evni: 1. Sámuelsbók kap. 10. Saul salvaður til kong. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Missións- og ungdómshúsið á Glyvrum**
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 18 Møti, Jógvan Højgaard talar. Øll eru vælkomin. www.jesus.fo

**Bønhúsið, Hellurnar**
Missiónsvikan byrjar hóskvøldið kl. 20. Knút Larsen talar og Hannis Hansen syngur. Øll eru hjartaliga vælkomin.
Fríggjakvøldið kl. 20 tala og syngja Jónhild og Gulak Hansen, kl. 22.30 Ungdómsløta.
Leygarkvøldið kl. 20 talar Niels Jacob Nielsen. Innsavnan til heimamissiónina.
Sunnukvøldið kl. 18 talar Regin Høgensen og Essa syngur.

**Frá Lívsins Orð**
Í dag kl. 17.30 møti Liljurnar.
Sunnudagin kl. 10.30 Møti.
Mánadagin kl. 17.30 Tim 5, kl. 20 Ungdómsmøti.

**KFUM & K í Norðoyggjum**
Missiónsmánaðurin heldur fram hesa vikuna. Bønarmøti er hvørt kvøld hesa vikuna kl. 19.
Fríggjakvøldið kl. 19.30 Møti við Regin Høgnesen, Magni Christiansen syngur.
Leygardagin kl. 10 Áhugatími við Jørmund Foldbo. Evni: »Vit byggja brýr«, kaffi, te og rundstykkir, kl. 19.30 verður konsert í Christianskirkjuni við kórinum og barnakórinum frá Sangskeiðinum hjá Heimamissiónini, andakt við Pól Jóhannassen.
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli kl. 17.30 Bønarmøti, kl. 18 Møti við Niels Jacob Nielsen, Gleði syngur, nátturði aftaná.
Ungdómsmøti/eftirmøti við Niels Jacobsen Nielsen, Askham syngur. Øll eru hjartaliga vælkomin til øll tiltøkini. www.kuff.fo

**Getsemane, Klaksvík**
Sunnudagin kl. 18 Møti.

**Betania, Skopun**
Sunnudagin kl. 11 Morgunmøti, kl. 18 Evangel. møti. Vælkomin í Betania.

**Missiónshúsið í Skopun**
Í kvøld kl. 20 kemur Sjómanskvinnuringurin saman. Mint verður á jólapakkarnar.
Fríggjakvøldið kl. 20.30 Húsmøti hjá Elin og Tórbjørn.
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 17.30 Bøn- og lovsongsløta, kl. 18 Møti. Hjartaliga vælkomin.

**Missiónshúsið á Tvøroyri**
Fríggjakvøldið kl. 21.30 Ungdómsmøti. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Evangeliskt møti**
Evangel. møti verður í skúlahøllini í Trongisvági leygarkvøldið 8. nov. kl. 20 við norska evangel. Svenn Thommy Fjeldberg. Biðið verður fyri sjúkum. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Missiónshúsið í Hvalba**
Um vikuskiftið verða møtir við John S. Myllhamar, trúboðara við hesum evnum:
Fríggjakvøldið kl. 20: Hin fyrri kærleikin.
Leygardagin kl. 17: Hitt heilaga samfelagið og kl. 20: Hin roynda trúgvin.
Sunnukvøldið kl. 19: Hin kristna vónin. Sunnukvøldið verður innsavning.

**Tilhaldið**
*í Tórsgøtu 21, tlf. 316491*
Opið er mánadag 10.00-18.00. Týsdag-fríggjadag kl. 10.00-17.00.
Drekkamunnur er at fáa hvønn dag, eins og bløðini eru til taks.
*Mánadagin 3. november*
kl. 10-10.30 Fimleikur, Sonja Danielsen
kl. 10.30-18 Vit hugsa um jólini
kl. 14-18 Kortspæl, telving, landastrok, bobbspæl,dart og onnur spøl.
Tilmelding til døgurðan miku- og fríggjadagin, tlf. 316491
*Týsdagin 4. november*
kl. 10-12.00 Vit baka til jóla
kl. 10-11.30 Vit syngja – Benny og Flemming Samuelsen. Øll eru hjartaliga vælkomin
kl. 14.30 Jórunn »forvitnast frá« Fridu hvussu tað var at vera barn í Havn í 1930 og 1940
*Mikudagin 5. november*
kl. 10-13.00 Matgerð. Anne Grethe Harlou
kl. 12.00 Døgurði. Til ber at koma sum gestir. Tilm. mánadag tlf. 316491
kl. 15.00 Sjá skránna í bløðunum
*Hósdagin 6. november*
kl. 10-10.30 Fimleikur, Sonja Danielsen
kl. 14-17.00 Telduprát
*Fríggjadagin 7. november*
kl. 10-13.00 Matgerð, Anne Grethe Hourlou
kl. 12.00 Døgurði. Til ber at koma sum gestir. Tilm. mánadag, tlf. 316491
kl. 13-17 Opið hús

*Tað er altíð ein krókur í Tilhaldinum – um tygum ikki fáast við nakað ítriv. Vit ynskja at øll skulu kenna seg vælkomin.*

**Pensionistafelagið í Havn**
Vit hittast hvørt mikukvøld kl. 19 í Losjuni til ymisk spøl so sum kort, talv, kinaskak og onnur spøl, einaferð um mánaðin hava vit bingo, tá møta vit kl. 18, so syngja vit eisini og fara vit uppá gólv av og á um áhugi er fyri tí. Aldurin fyri at koma og blíva limur er 60 ár, tó er aldurin fyri fyritíðar- og avlamispensionistar 55 ár. Øll m/k eru vælkomin í felagið.

**Fløvi – dagtilhaldið fyri pensiónistar**
*í kvinnufelagshúsinum á Glyvrum*
*Mikudagin 5. nov.*
Drekkamuður.
Fimleikur v/ Jóhannus Troest.
Upplestur.
*Hósdagin 6. nov.*
Drekkamuður.
Afturhvart í práti og sangi.
*Fríggjadagin 7. nov.*
Drekkamuður.
Opið hús.

*Eins og vanligt er, verður byrjað við einum Guðs orði, og framvegis eru luttakararnir vælkomnir at taka eitt og hvørt ítriv við sær, eitt nú stokkar o.a. Víðka ítriv bæði fyri menn og kvinnur.*

**Tilhaldið Hugnin í Sandoynni**
Tilhaldið í Sandoynni er opið mánadag og mikudag frá kl. 14-17. Báðar dagarnar er drekkamuður at fáa.

**Dagtilhaldið í Vági**
er hvønn týsdag og tórsdag frá kl. 15 til 18. Øll eru vælkomin.

**Spælistovan í meinigheitshúsinum**
er opin mána-, miku- og hósdag kl. 9-12 fyri foreldur við børnum, sum ikki hava ansing.

**Føroya Heimavirkisfelag**
Postadressa: J. Paturssonargøta 24, 100 Tórshavn.
Formaður: Óluva Vilhelmsen.
T-postur: fhf@craft.fo
Heimasíða: www.craft.fo
Tlf. 322686 / 319629

**Reyði Krossur Føroya**
Sorgarlinjan svarar mánadag, mikudag og fríggjadag kl. 19.00-21.00 á tlf. 319630.
Kennir tú føroying í Keypmannahavn, ið hevur tørv á vitjan ert tú vælkomin at seta teg í samband við Reyða Kross Føroya, Bryggjubakki 10, 100 Tórsh. tlf. 319630/61 655400.

**ACA**
(Adult children anonymous). Fundur fyri tilkomin, ið eru uppvaksin í alkoholiskum ella dysfunktionellum familjum er hvørt leygarkvøld kl. 20.00-21.30 á Tinghúsvegi 37, Tórshavn. www.aca-danmark.dk.
E-mail:
acafaroeislands@hotmail.com

## BRÚDLEYP

Leygardagin 8. november kl. 16.00 giftast í Havnar kirkju Annika Smith, Tórshavn og Haldur Suni Johansen, Klaksvík. Veitslan verður hildin fyri innbodnum í Neystinum hjá Argja Kappróðrarfelag.

## 70 ÁR

Hósdagin 6. november fyllir Jógvan Falkvard í Sørvági 70 ár. Dagurin verður hildin í Húsmøðrafelagshúsinum leygarkvøldið 8. november.

## 80 ÁR

Hósdagin 6. november verður Marin Kristina Hammer, Fámjin, 80 ár. Føðingardagurin verður hildin leygardagin 8. november í Vesturhøll frá kl. 19. Øll eru vælkomin.

Leygardagin 8. november fyllir Martin Danielsen, Miðvágur, 80 ár. Dagurin verður hildin hjá Paula og Anna Mariu.

## SILVURBRÚDLEYP

Týsdagin 25. november hava Maria og Jonnar Djurhuus, Morskranes, silvurbrúdleyp. Dagurin verður hildin í bygdarhúsinum á Strondum 25. nov. kl. 18.30. Tey, ið vilja gleða silvurbrúðarparið við atkoma, verða biðin um at ringja 448173/218173 áðrenn 16. nov.

HAVNAR BIO
Tlf. 31 19 56
www.bio.fo



Hósdagin 06.11. kl. 19.30
Hósdagin 06.11. kl. 22.15



Hósdagin 06.11. kl. 20.45



Hósdagin 06.11. kl. 18.30



Hósdagin 06.11. kl. 23.00
– *Seinasta sýning*

BIO KIOSKIN
Heitt Pop-Corn - Coca Cola - Góðgæti - Fóm ís - o.m.a.

Stórt úrval av DVD-filmum til sølu